# FRÁ FORVITNI TIL ISLAM

**ABBI** HANSARA VAR **DEKNUR** Á HÚSUM. **OMMA** HANSARA PLAGDI AT LESA **BÍBLUSØGUR** FYRI **HONUM**. OG HANN GEKK **JAVNAN** Í KIRKJU. MEN NÚ ER TANN **KRISTNI** JENS HENDRIK DJURHUUS **BLIVIN** TIL MUSLIMIN **OMAR DJURHUUS**. LES SØGUNA HJÁ HONUM **HER**



**KONVERTERING**

Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

Í 1994 flutti Jens Hendrik Djurhuus til Danmarkar við familjuni. Kreppan fekk nógv húski at pakka saman, og familjan Djurhuus var millum teirra, sum stungu í sekkin og fluttu av landinum.

Tey kendu ongan, tá tey komu niður, og tí mátti tann tá 13 ára gamli Jens Hendrik finna sær ein nýggjan vinarskara.

– Eftir at hava búð í Danmark í umleið eitt ár, kom eg at kenna ein drong, sum var muslimur. Eg var heima hjá teimum, og eg var rættiliga yvirraskaður av tí, eg upplivdi har.

– Har vóru myndir av Mekka á vegginum, og mamman lá á einum teppi og bað. Eg var ungur og forvitin, og eg byrjaði at spyrja tey um, hvat hetta var fyri nakað. Tey svaraðu mínum spurningum, og soleiðis byrjaði eg at fáa áhuga fyri islam.

## Islam var rætta trúgvin

Omar, sum Jens Hendrik nú kallar seg, greiðir frá, at religiónin altíð hevur verið ein partur av honum.

– Abbi mín á Húsum var deknur, og tá eg var har og ferðaðist, læs omma bíbilsøgur fyri mær, og eg var við abba í kirkju. So hetta við trúgv og religiøsum søgum var ikki fjart fyri mær, greiðir hann frá.

Í fyrstuni lá ikki meiri í tí enn reint forvitni. Men sum hann gjørdist eldri, fór hann at lesa meiri um islam.

– Eg studeraði tað væl og setti meg inn í tingini. Eg fór at samanbera Bíbliuna og Koranina, eg læs eina rúgvu av bókmentum um evnið, og eg granskaði søguna.

Stóra broytingin hendi, tá Jens Hendrik fann eina bók, sum æt: »What did Jesus really say?«, sum Misha'al ibn Abdullah hevur skrivað.

Tað er ein bók, sum samanber Koranina og Bíbliuna.

– Tá byrjaðu spurningar at reisa seg um Jesus veruliga var sonur Guds, ella um hann mundi vera ein profetur.

Eftir at hava sett seg væl inn í tingini og lisið stakkavís av bókum, kom Jens Hendrik til ta niðurstøðu, at islam var rætta trúgvin fyri hann.

## Gjørdist muslimur

Tá hann var sannførdur um, at bara ein Gud er til, at hóast Jesus hevði stóran týdning fyri heimin og islam, so var hann tó »bara« ein profetur, og at Muhammed var guds seinasti profetur, konverteraði hann. Tað var ringt fyri tey, hann kendi, tá hann brádliga segði teimum, at hann nú var vorðin muslimur.

> *»Serliga fyri familjuna, sum einki ánaði um mín vaksandi áhuga fyri religiónini, var tað torført. Tey vóru øgiliga yvirraskað og reageraðu rættiliga harðliga...*

– Serliga fyri familjuna, sum einki ánaði um mín vaksandi áhuga fyri religiónini, var tað torført. Tey vóru øgiliga yvirraskað og reageraðu rættiliga harðliga, tí tey vistu einki um mín áhuga.

– Eg haldi, at tað, sum eisini gjørdi tað so ringt, var, at tey einki kendu til islam. Tað, sum fólk vita, stavar í stóran mun úr donsku miðlunum, og tað er ikki tann vakrasta myndin, ið verður málað har.

– Muslimar hava ikki gott orð á sær, og tí vóru tey kedd. Tey kendu einki uttan hesa skeiklaðu myndina, sum miðlarnir so leingi hava víst. Og tað, sum man ikki kennir, tað ræðist man ofta, greiðir Omar frá.

Hann sigur, at tey vóru full av fordómum frá miðlunum, og at tey vóru bangin fyri, at hann var komin inn í eina sekt av onkrum slagi. Hann setti seg tí niður við familjuni og greiddi teimum gjølla frá síni sannføring, og hvat islam merkti fyri hann. So við og við skiltu tey hann betri.

– Eg royni ikki at sannføra tey um at konvertera eisini. Tað ber ikki til at sannføra nakran, sum ikki sjálvur vil trúgva. Men eg royni at vera ein góð fyrimynd við míni lívsførslu, greiðir Omar frá.

## Frá Jens Hendriki til Omar

– Í okkara familju hava vit altíð lagt dent á nøvn. Eg æt Jens Hendrik eftir abba mínum, pápi mín æt Jens Kristian eftir abba sínum, og soleiðis hevur tað verið í nógv ættarlið. Men eg eri av tí hugsan, at fólk eru einstaklingar og eiga at ráða sjálvi. Eg varð drigin inn í eina navnatradition, sum eg ikki sjálvur hevði valt. Tað gjørdist mín ▶